# Framsýningarøkið størri enn nakrantíð

**– Nú altjóða fiskivinnustevnan er sett og latin upp, kunnu vit endaliga staðfesta, at einir 250 framsýnarar eru við, og hesir umboða fleiri enn 300 einstakar fyritøkur úr Føroyum og útlandinum, sigur Dánjal Petur Hansen, sum samskipar framsýningina hesaferð**

NAFF
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Altjóða fiskivinnustevnan, North Atlantic Fish Fair, sum í hesum døgum verður hildin á Sandvíkahjalla, livir upp til tær vónir, sum fyrireikararnir hava sett sær.

Tá ið stigtakararnir fyri fýra árum síðan settu sær fyri at skipa fyri eini altjóða fiskivinnustevnu í Føroyum, soleiðis sum vit kenna hesar stevnur aðrastaðni, var torført at meta um, hvør áhugin fór at vera.

Tó er tað ikki at taka munnin ov fullan at siga, at tann fyrsta stevnan gjørdist ein rættilig "succes". Longu á North Atlantic Fish Fair 2001 vóru 212 fyritøkur, 105 útlendskar og 107 føroyskar, og tilsamans vitjaðu 7.000 gestir. Hetta var væl meira, enn stigtakararnir nakrantíð høvdu torað at droymt um.

Longu eftir fyrstu stevnuna fekk North Atlantic Fish Fair viðurkenning og herðaklapp á Vinnudegnum sum "Ársins átak".

Onnur framsýningin eydnaðist minst líka so væl sum hin fyrra við framsýnarum úr 17 londum og einum samlaðum tali av einstøkum fyritøkum, sum var omanfyri 300. Framsýnarar vóru í 17 londum og vitjandi úr tilsamans 22 ymiskum londum. Talið av vitjandi var omanfyri 10.000!

### Stór undirtøka

Aftur hesaferð, nú triðja framsýningin í røðini er sjósett, liggur talið av framsýnarum um 250, og tilsamans eru fleiri enn 300 einstakar fyritøkur umboðaðar á básunum kring um í høllini á Sandvíkahjalla.

Hóast øll framsýningin nú er undir einum taki, er framsýningarøkið hesaferð størri enn á undanfarnu framsýningum.

Fyrsta árið var framsýningarøkið stívliga 3.000 fermetrar, annað árið umleið 4.000, men hesaferð nærkast samlaða fermetratalið teimum 5.000.




*Einir 250 framsýnarar eru við á North Atlantic Fish Fair hesaferð, og samlaða talið av einstøkum fyritøkum er omanfyri 300*
Mynd: Jens Kr. Vang




*Nógvir áhugaverdir framsýnarar eru við á NAFF hesaferð og Sosialurin, sum hevur bás og redaktión á framsýningini, fer at venda aftur til fleiri teirra*
Mynd: Jens Kr. Vang

## Sosialurin hevur bás og redaktión á NAFF




*Longu fyrrapartin týsdagin hevði Sosialurin vitjan av samskiparanum av NAFF, býráðsformanninum og øðrum*
Mynd: Vilmund Jacobsen

NAFF
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Millum tær stívliga 300 fyritøkurnar úr Føroyum og útlandinum, sum eru við á NAFF, er Sosialurin eisini umboðaður á bási við redaktión og umboðum fyri marknaðardeildina.

Vit fara at fylgja gongdini á framsýningini, og vit fara at vitja básar, sum hava eitt hvørt áhugavert at sýna fram.

Inni á básinum fáa fólk eisini kunning um Sosialin og tær tænastur, sum Sosialurin veitir sínum verandi og komandi viðskiftafólkum.

Básurin hjá Sosialinum verður marknaðarførdur undir heitinum, "Miðla-húsið í Vágsbotni", nú alt virksemið er flutt í nýggj hølir í Vágsbotni.